Dimmalætting

Stovnað 1878
*Ábyrgdarbladstjóri:* Beate L. Samuelsen
*Bladstjóri:* Georg L. Petersen
*Útgevari:* P/F Dimmalætting
*Prent:* Dimmalætting

AVGREIÐSLA: Mánad. til hósd. kl. 8.00-17.00. Friggjad. kl. 8.00-16.00. Leygard. stongt. Tlf.-avgreiðsla kl. 8.00-16.00.
Tlf. 311212. Fax: 310941. Smyrilsvegur 13, Postboks 19, FO-110 Tórshavn
*e-mail:* redaktion@dimma.fo, prent@dimma.fo, lysing@dimma.fo, baldari@dimma.fo, bokhald@dimma.fo, kronikk@dimma.fo, vidskerin@dimma.fo

**INNLATINGARFREIST FYRI LÝSINGAR**

| | Týsdagsblaðið | Mikudagsblaðið | Hósdagsblaðið | Friggjadagsblaðið | Leyg.dagsblaðið |
|---|---|---|---|---|---|
| Størri lýsingar | frí. kl. 12 | mán. kl. 12 | týs. kl. 12 | mik. kl. 12 | hós. kl. 12 |
| 2 tg. tekstlýsingar | má. kl. 10 | týs. kl. 10 | mik. kl. 10 | hós. kl. 10 | frí. kl. 10 |
| Okkara Gulu | frí. kl. 15 | | týs. kl. 15 | | hós. kl. 15 |

Lýsingar, ið nógv arbeiði er av, mugu vera inni í góðari tíð.
Litlýsingar og lýsingar við framíhjáplássi skulu bíleggjast í góðari tíð.

**Vanligar treytir:** Síðustødd: 8 teigar á 41x515 mm. 1/1 síða 4.160 mm. Útsjónd: Lýsingar, sum eftir blaðsins meti kunnu mistakast fyri blaðtilfar, skulu merkjast við orðinum: Lýsing, sum verður roknað uppí lýsingarmatið. Orðið INSERAT verður ikki góðtikið. Innlatingarfreist fyri lýsingar: Sæst á skemanum til vinstru.

**Fyrivarni:** Innihaldið í lýsingunum má ikki stríða móti galdandi lógum. Ábyrgdina fyri hesum hevur lýsarin. Blaðið tekur sær rætt til at sýta at taka lýsingar við, sum blaðið metir óynsktar.

Teknisk viðurskifti og umhugsan fyri lesarum og lýsarum ger, at blaðið má tilskila sær rætt til at
1. gera smærri týdningarleysar broytingar í lýsingum hvat teksti og uppsetan viðvíkir.
2. skjóta út eina lýsing til seinni blað.
Litlýsingar kunnu bert takast við, um teknisku viðurskiftini loyva tað.

Endurgjald fyri møguligar villur, sum lýsarin sjálvur ikki hevur skyldina fyri, er vanliga prísavsláttur eftir blaðsins meti um virðisminkan av lýsingini, men í mesta lagi at lýsingin, ella líknandi lýsing, verður tikin við aftur seinni ókeypis. Villur, sum standast av vánaligum lýsingartilfari hevur blaðið onga ábyrgd av.
Lýsingar, sum verða inntelefoneraðar, verða altíð lisnar uppaftur, og blaðið tekur tí onga ábyrgd fyri villur, sum koma á henda hátt.

# Oljuvónin

TAÐ er ikki so, tá alt er á gosi, so sum tað hevur verið í Tinganesi seinastu dagarnar í sambandi við undirskrivingina av marknaavtaluni millum Føroyar og Bretland.

Vit hava rundað ein hornastein sambært teimum, sum hava skil fyri innihaldinum í undirskrivaðu avtaluni, sum fingin er upp á pláss.

Vit kundu fingið meiri burturúr við at bíðað eitt sindur longur, tí hvønn týdning hevði tað, um vit tingaðust eitt ella tvey ár aftrat, tá vit longu hava tingast um marknamálið í meiri enn tjúgu ár? Tað hevði kanska fingið ein sera stóran týdning fyri okkum sum eina komandi oljutjóð, sum nógv halda, at vit einaferð fara at gerast.

At vit ikki øll eru samd um hetta, er ein onnur søga, og ikki skal vónin um eitt komandi føroyskt ævintýr takast frá teimum mest bjartskygnu, har hin ítarsti man vera landsstýrismaðurin í oljumálum, sum endiliga sær ein glotta fyri framman til at fáa okkurt at takast við eftir at hava gingið og bíðað eftir oljuni, meðan hann frá skrivstovu síni, tá ringast hevur staðið til, hevur hugt út gjøgnum skrivstovugluggan og yvir móti Viðarnesi, har stóru oljutangarnir hava gjørt sítt til, at hann hevur fingið vónina um Føroyar sum eitt oljuland aftur.

Nógv orka og nógvir tímar eru tilsamans nýtt í sambandi við hetta, sum nú er komið upp á pláss fyri fyrst. Men enn liggja stórar avbjóðingar fyri framman, sum skulu bjóðast út í fleiri umførum.

Sera avmarkað er, hvat vit sum føroyingar fáa burtur úr øllum hesum, sum hevur kostað pening, tá tað snýr seg um sjálva avtaluna, meðan alt tað praktiska arbeiði, sum fer fram úti á havøkjunum við seismiskum kanningum o.l., higartil ikki hevur kostað okkum eina krónu

Tíbetur, kunnu vit siga, og seta okkara álit á tær inntøkur, sum kanska koma at falla í okkara lut, eftirsum vit hava tryggjað okkum, at allur vøruflutningur av ymsum slag til og frá oljuøkjunum skal fara um føroyskan keikant. Ein trygd, sum politikarar okkara hava treytað sær, so vit ikki missa alt á gólvið.

Hvussu alt hetta kemur at eydnast, er eingin okkara førur fyri enn at siga, uttan tað, at nú er alt klárt at fara til verka á oljumarknaðinum, og týdningarmikið er, at tað arbeiðið, sum nú skal fara fram, verður gjørt á ein skilagóðan hátt og í tí røttu raðfylgjuni, hvør hon so er.

## Brøv til Dimmalætting

### Evni: Privatkoyring við almennum tænastubilum

Hetta er helst eitt evni, sum almenningurin eigur at hava alstóran áhuga fyri.

Javnan sær man hesar almennu bilar verða brúktar til privata koyring av øllum slag. Ja, teir verða brúktir til at keypa inn í, koyra epli við, koyra hoyggj til seyð og alt møguligt annað.

Hetta hendir hvønn dag, og ofta eisini um vikuskiftið, tá bilurin eigur at standa á stovninum.

Eg varð mær ein dagin gangandi Yviri við Strond, og hetta var eisini um vikuskifti, og so kemur ein fínur, nýggjur jeepur hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni koyrandi í privatum ørindum og koyrir oman móti eini trøð.

Í lastini á bilinum lá hoyggj og annað til seyð, og bilførarin fekk alt burtur úr bilinum og inn á trøðna. Aftan á lokið arbeiði koyrdi bilurin víðari privat, har hann ikki má koyra.

Bilurin hevði ikki merki á, men tað hevði fyrri bilurin, stovnurin hevði. Merki eiga at koma á bilin skjótast.

Hetta er bert eitt dømi um stovn, men tað eru mangir aðrir, sum gera hetta, og hetta eigur at átalast harðliga, tí her brúkar man bensin og annað til bilin.

Hvat er hetta fyri fólk, sum so grovt misbrúka ognir stovnsins?

Vónandi fara aðrir lesarar eisini at gera vart við seg.

Starvsfólk eiga at fáa harraboð frá stovninum beinanvegin um bert at brúka bilarnar til tænastubrúk og seta teir við stovnin eftir loknan arbeiðsdag.

Annars eigur hetta at fáa fylgjur fyri viðkomandi.

**Eygleiðari**

## Tillukku við barninum

*Hvønn leygardag ynskir Dimmalætting foreldrum tillukku við lítla barninum, annaðhvørt bara í teksti ella í teksti og myndum. Hetta gera foreldrini sjálvi av. Send brævbjálvan til Dimmalætting, postboks 19, 110 Tórshavn merkt »Tillukku við barninum«, skriva avsendara, navn og adressu, so vit kunnu senda myndina aftur sum skjótast. Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd í blaðið. Vit skulu hava myndirnar í seinasta lagi friggjamorgun. Um foreldrini ynskja tað, kann myndafólk frá blaðnum taka myndina ókeypis. Ring 311212, og vit avtala nærri*





## Orðið

*Les 5. Mósebók 32,1-14*

**REIÐRINGARÓRÓGV**

*Sum ørnin vekur reiður sítt ... Tað var Harrin eina, ið leiddi hann. – 5. Mósebók 32,11-12*

HÚSKALLURIN ansaði eftir, at fuglur skundmikil bygdi sær reiður. Tíverri tókst hann við tað á greinarúgvu, ið fyri stuttum var stývað av trøum og skuldi beinast burtur. Við tí í huga helt húskallurin, best mundi vera at forkoma reiðrinum, so fuglurin fann sær okkurt tryggari stað; hann so gjørdi. Dagin eftir kom fuglurin, ið væntaði sær at blíva mamma, aftur og tók at byggja av nýggjum á sama staði, sum húskallurin hevði rivið fyrra reiðrið burtur. Nú mátti húskallurin so gera tað sama uppaftur. Triðja dagin fór fuglurin at reiðrast undir takskegginum nær við køksdyrnar. Hesu ferð fekk hann frið. Ótrygga greinarúgvan, haðani fuglurin var rikin tvær ferðir, bleiv brend, áðrenn brostið var fyri nevi.

Hjá okkum verða ætlanir onkuntíð kollrendar. Vit undrast, at Gud rívur upp jarðiska reiður okkara, sum vit hava barst og arbeitt so hart fyri. Men dugdu vit at sæð tað, sum Hann sær, høvdu vit ásannað, at Hann roynir at útvega okkum lagaligari lagnu, eitt tryggari stað og nøktaðan tørv. Soleiðis leiddi Hann ísraelsfólk úr Egypt, um oyðimørkina og inn í lovaða landið. Hann visti, hvar vandamikið var og hvar trygt.

Bara vit lærdu at lítið á Gud uttan spurning um vísdóm Hansara og góðsku – sjálvt á myrkastu leiðum lívsins og við órógv í reiðri.

© -prp-

## Minningarorð

### *Pápa mínum*
# *Karl Johan Hansen*
### *til minnis*

*f. 29. juli 1921 – d. 26. januar 1999*



»Tak er kun et fattigt ord, når det gælder dig« úr kenda sangingum hjá Poul Bundgaard vóru fyrstu orð, sum runnu mær í huga, løtuna aftaná at tú vart sloknaður týskvøldið 26. januar á Landssjúkrahúsinum. Men eg fann einki annað at seta ístaðin.

Tað er nú einaferð soleiðis vorðið, at tað er tyngst at missa tey, sum hava givið tær mest, meðan tey vóru her, og tí er tað so tómt, nú tú ert farin, at orð kunnu ikki siga frá tí. Men tað er ein stórur uggi at eiga bæði nógv og gott at minnast.

Tú traðkaði tínar barnaskógvar í Lamba, og hóast tú at kalla einki hevur búð har síðani í 1939, tá tú fórt til Havnar at ganga í skúla, so vart tú lambamaður bæði við lívi og sál, so leingi sum tú livdi.

Tú dugdi at siga frá sum fáur, og tú hevur stytt okkum manga stund við at fortelja søgur um gamlar dagar í Lamba. Hesi fólkini vóru tað nógva av hundrað árum eldri enn eg, men kortini sá eg tey so ljóslivandi fyri mær, meðan tú fortaldi.

Hóast tú og mamma valdu at liva »upp á gamla máta« – tú skaffaði pengarnar, og mamma var heima – so var einki við, at gentur ikki máttu gera tað, sum var fyri dreingir, og umvent; vit sluppu at gera tað, sum hugur og evni vóru til. Serliga dýrabar er mær tann løtan, tá vit bæði gingu undir neystunum í Lamba ein summardag fyri nógvum árum síðani. »Arkin« stóð úti, og tú byrjaði at siga mær, hvussu borðini á báti itu. Tú mundi hava varhugan av, at eg tímdi at lurta, tí at tú gavst ikki, fyrr enn tú hevði sagt mær navnið á hvørjum einasta spreki í bátinum. Ikki eitt orð um, at tað ikki var fyri gentur.

Skrivarastarvið hjá Runavíkar Kommunu gjørdist títt lívsstarv, og tá ið tú legði frá tær á sumri 1989, hevði tú stutt frammanundan havt 40 ára starvsdag, og tað er ikki smávegis í einum tílíkum starvi. Áðrenn Sjómansheimið kom seinast í trýssunum, var einki stað at fara at bjóða fólki ein bita, so at tann representatión, sum fylgdi við tínum starvi, gekk fyri seg í stovuni hjá okkum – tí tók mamma sær av. Hetta starvið hevði eisini við sær, at tú gekst meira ella minni pyntaður, men kortini dámdi tær best, tá ið tú í ketildrakt, reyðhúgvu og gummistivlum gekst og riggaði teg til at fara á flot – tí at sleppa út fyri Lambavík við snøri var tær bæði heilsu- og sálarbót. Og frá tí, at tú og mamma settu føtur undir egið borð í 1951, og líka til nú fiskaði tú at kalla hvønn fiskabita, sum bleiv etin í húsinum.

Tað neit okkum øllum fast, tá mamma í 1980 fekk staðfest krabbamein, sum var komið so langt, at lívið ikki stóð til at bjarga. Men tú kláraði heilt ótrúliga væl ta ovurstóru broyting, sum tað var at fara at halda hús einsamallur, aftaná at hon var deyð í desember 1982. Av tí at mamma altíð var heima, hevði tú lítið og einki blandað teg upp í tað húsliga, men tú kókaði tær døgurða sjálvur at kalla hvønn einasta dag og lærdi teg eisini at koyra vaskimaskinuna frá, hóast tú vart 61 ára gamal tá.

Kortini treivst tú ikki rættiliga einsamallur, og betri dømi um lívsmót enn at giftast uppaftur, tá ein er komin miðskeiðis í trýssini, skal leitast leingi eftir. Kathrina og tú brúktu hesi umleið 12 árini, tykkum untist saman, til fulnar, bæði tykkum sjálvum og okkum, sum stóðu tykkum nær, til nógva gleði. Tí tit hava fingið so nógv meir burtur úr hesum árunum við at vera saman, enn um tit høvdu verið verandi hvør sær.

Tað, sum tær kanska dámdi allarbest, var at vera abbi, og tú ringdi dagliga runt til okkum øll at vita, hvussu abbabørnini høvdu tað – hvat tey gjørdu, hvussu teimum dámdi at ganga í skúla, hvussu tey trivust o.s.fr. Sum dømi kann eg nevna, at ein abbasonur einaferð kom inn á gólvið hjá tykkum saman við tveimum vinmonnum at spæla sjavs – teimum manglaði fjórða mann, og so var bara at boða til abba, og ongantíð betur enn at Kathrina-omma átti nýbakaðar bollar.

Tá ið eg á sumri 1997 kom at siga tykkum, at eg var sloppin inn á Sjúkrasystraskúlan og ætlaði at setast aftur á skúlabonk 36 ára gomul, segði tú: »Hatta klárar tú, Kathrina góða.« Ikki eitt orð um, at eg var ov gomul, ella at eg ikki kundi fara út frá børnunum; men eg skal viðganga, at eg hevði eisini væntað okkurt sovorðið, og tú hevur verið mær ein hollur moralskur stuðul alla tíðina.

Ikki so sjáldan hevur ungdómurin verið lastaður fyri at vera oargaligur, koyra skjótt o.s.fr. Eg haldi meg ikki hava hoyrt nakran annan enn teg venda uppí og forsvara tey ungu; Ja, tú segði enntá, at tit høvdu verið verri, um tit høvdu havt somu møguleikar, sum ungdómurin hevur nú.

Satt at siga var eg eitt sindur bangin um, hvussu tú skuldi fáa tíðina at ganga, tá ið tú bleivst pensioneraður, so eg orðaði við teg um at fara niður í hálva tíð fyrst, men tað vildi tú ikki; og sanniliga hevur tú verið virkin hesi tíggju árini, sum tú vart pensionistur. Nýggjárskvøld vart tú við okkum í føroyskum dansi, og sama kvøld, sum tú bleivst innlagdur, var tú á pensionistafundi. Tú hevði alla tíðina meir stríð av at fáa tíðina at røkka, heldur enn at fáa hana at ganga.

Heðin Brú sigur í yrking síni »Fedranna tala«, at lívlát er ikki deyðin, lívlát er hetta at seta førningin av sær við vegin, tað, sum frá fedrunum goymdist, til komandi ættarlið at bera víðari fram. Tú hevur fylt tín ríkiliga part í tann sekkin, sum tú nú hevur sett frá tær, tí tú hevði eina ótrúliga vitan um alt møguligt, og øll, sum leitaðu til tín fyri at fáa okkurt at vita, fingu ta hjálp, sum tú vart førur fyri at veita teimum. Nú skulu vit bera víðari eftir førimuni.

Tú segði mangan, at tú stúrdi fyri at koma á eitt ellisheim at sita og bíða eftir deyðanum, men hann, ið øllum valdar, læt teg hava heilsuna líka til tað seinasta, og tøkk fái hann fyri tað.

Hvíl í friði.

**Kathrina**

## Andlát og tøkkir

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæra kona mín, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

***Thyra Jensen***
Kastrup
(kona Valdemar Jensen av Trøðni á Stykkinum)

andaðist á Skovbo plejehjem leygardagin 15. mai, 85 ár.
Jarðarferðin verður úr Bjæverskov kirkju, DK-4632 Bjæverskov, friggjadagin 21. mai 1999 kl. 13.

Fyri tey avvarðandi
*Valdemar*
*Johan, Ole Jakob, Eva og Elsa við familjum*

### Tøkk

Fyri sýnda samkenslu, tá kæri maður, faðir, verfaðir og abbi okkara

***Guldbrand Joensen***
ættaður úr Skopun
búsitandi á Argjum

andaðist og varð jarðaður, takka vit hjartaliga. Tykkum, ið við uppringing og vitjan hugsaðu um hann, meðan hann lá sjúkur, og øllum tykkum, sum fylgdu honum, takka vit hjartaliga.

Fyri tey avvarðandi
*Hanna*

### Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum vóru um okkum, tá ið kæri maður, pápi, abbi og langabbi okkara

***Kristian Mikkelsen***
Sørvági

var sjúkur, doyði og varð jarðaður. Takk til tykkum á B6 á Landssjúkrahúsinum, sum vóru um hann. Takk til Jacob fyri góð og troystarrík orð í kapellinum, takk til organistin og tykkum øll, sum vóru saman við okkum har. Takk fyri blómur, kransar og gávur til missiónshúsið. Takk til David prest fyri góð og troystarrík orð í kirkjuni, takk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og gravarar. Takk til streingjakórið fyri vakran sang. Takk til tykkum øll, sum hjálptu til við ervið. Hjartans takk øll somul, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað og annars hjálptu til á ymiskan hátt.

Familjunnar vegna
*Ragna, Sjúrður og Michael*

### Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum, sum mintust okkum á føðingardøgunum.

Blíðar heilsanir
*Hjørdis og Alberg*

Tlf. 311212
Dimmalætting
Fax 310941